## Kanónspurtur



Malan Bærentsen byrjaði kappingina á geil 6, tá 200 metrar skuldu svimjast í bringusvimjing. Størsta partin av teininum líktist tað einum fjórða plássi hjá Maluni, men seinastu 50 metrarnar kom ferð veruliga á. Hon streyk uttan nakað hóvasták fram á bronsumerki, og í einum sera tøttum endaspurti vann hon seg upp á eitt flott silvurmerki.

## Bronsa til Beinir

Tá menninir svumu 50 metra frí, hevði Beinir Davidsen næst bestu tíðina í innleiðandi umfarinum. Hetta plássið megnaði hann tó ikki at halda, men við einum bronsumerki traðkaði hann tó eisini upp á skammilin gylta týsdagin á Rhodos.

# Áskoðararnir gera munin

**Pál Joensen heldur, at sjálvsálit, viðrák og góður áskoðarastuðul eru millum høvuðsorsøkirnar til framúr úrslitini, sum Føroyar hava vunnið í svimjing**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan týsdegnum varð tosað um, at Føroyar høvdu góðan møguleika til tvey – kanska – fýra heiðursmerki úr gulli. Endaliga úrslitið varð tó betri enn so við ikki færri enn fimm úr gulli, umframt einum silvur- og trimum bronsumerkjum.

Ein av svimjarunum, sum aftur hesa ferð gjørdi vart við seg, var Pál Joensen. Og hann helt, at umframt góða og miðvísa venjing, so vóru eisini onnur viðurskifti, sum veruliga togaðu svimjararnar seinasta pettið.

- Góðu úrslitini í gjár hava sjálvandi givið okkum eyka sjálvsálit. Men tað, at nógv tann størsti parturin av áskoðarunum eru føroyingar, hevur sanniliga eisini nógv at týða. Teir gera heilt óluksáliga góðan mun. Tú bæði sært og hoyrir tey, meðan tú svimir, og tað er veruliga við til at seta seinasta trumfin á.

### Báðir undir metið

200 meturin, sum Pál svam týsdagin, gjørdist ein óhugnaliga spennandi av slagnum. Nærmasti kappingarneytin, ið var av Jersey, svam undir gamla oylmetið. Gamla, tí Pál júst hevði sett nýtt met, áðrenn næsti maðurin kom inn.

- Eg sá, at eg lá nakað frammanfyri, men spakuliga byrjaði hann at taka meg aftur. Men á seinastu 25 metrunum, tá helt eg meg síggja, at eg kortini skuldi vinna kappingina.

Umframt oyggjaleikamet, so var talan eisini um føroyskt met á teininum. Eitt met, sum Pál sjálvur ikki átti undan týsdegnum.



*Størsti parturin av áskoðarunum til svimjikappingarnar eru føroyingar. Og tað munar væl, slær Pál Joensen fast*
*Mynd: Jákup*

## Optimistar vinna fram

**Kristian Olsen varð róptur »optimisturin« tá hann tordi at droyma um 11 oyl-gull til Føroyska liðið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá føroyska mansstafettin fór fyrst á mál týsdagin, var hetta samstundis nýtt met fyri Føroyar. Í teirri løtu fór 2007 liðið fram um úrslitini á heimavølli í 1989, har Føroyar fingu seks gullmerki.

Upprunaliga vóru almennu boðini frá svimjarunum annars, at tey høvdu vónir um eini fimm gullmerki. Tað málið er í øllum førum væl og virðiliga rokkið eftir teir báðar fyrstu kappingardagarnar. Men hetta var kanska eitt mál, sum eingin tordi at tosa hart um.

- Eg eri kanska eitt sindur svakligur. Men eg hevði hopað, at vit kláraðu eini 11 gullmerki. Og tað sær eisini út til at halda, segði ein av føroysku stafett-manningini, Kristian Olsen.

»Optimisturin hjá okkum« var onkur av liðfeløgunum skjótur at svara, men við átta av slagnum higartil, so er kanska ikki so veruleikafjart at droyma um, at hetta kann verða úrtøkan.

Og Beinir Davidsen kundu so eisini staðfesta, at kanska var Kristian ikki heilt svakligur kortini.

- Talið av gullmerkjum fer upp um hasi ellivu. Tað verður so við vissu besta oyggjaleikaárið nakrantíð hjá føroyskari svimjing.

# Mylluarmar til gullið



*Restin av feltinum hevði ongan møguleika, tá Elspa setti ferð á*
*Mynd: Jákup*

**Tá Elspa Mørkøre fyrst visti, at restin av feltinum var aftanfyri, fóru armarnir bara at mala**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tveir tíggjundapartar av einum sekundi vórðu skornir burtur, tá Elspa Mørkøre setti persónligt, føroyskt og oyggjaleikamet á 100 metra teininum í rygg.

At síggja til, so hevði Elspa Mørkøre fult tamarhald á kappingini allan vegin.

- Eg sá tær alla tíðina aftan fyri meg, og so fóru armarnir bara runt – fusj, fusj, fusj, flenti hon.

Talan var um triðju finaluna og fjórða heiðursmerkið, sum Føroyar vunnu hetta kvøldið, og tí var skilligt, at adrenalinið hjá svimjarunum veruliga var komið í kroppin.

Í øllum førum ivaðist Elspa ikki tað allarminsta, tá hon varð spurd, hvørt hetta fór at verða stílurin restina av kvøldinum.

- Yes, tað verður tað. Ikki minst verður spennandi at vita, hvørt báðar stafettirnar kunnu vinna gull, helt hon.